

Siem Garnet

# Siem Garnet fekk tamarhald á práminum

**Jógvan Hugo Gardar**

31.12.2015 - 15:05

Oljan.fo

Tað hevur nú eydnast bjargingarliðum at fáa fest ein enda á prámin sum hevur rikið fyri váð og vind í Norðsjónum síðani í gjár.

Um middagsleitið fór prámurin framvið Valhall-boripallinum, og løtu seinni kundi Stavanger Aftenblad skriva, at báturin Siem Garnet hevði fingið tamarhald á leysa práminum.

LES EISINI: Prámur fór framvið tí fyrsta oljuboripallinum: Royna at forða fyri einum stórum oljuleka

Tveir føroyingar sigla við Simon Garnet, men báðir eru heima hendan túrin.